## Lata bókasøvn aftur

Tey seinastu árini hava tær donsku kommunurnar spart á fleiri økjum, og nú vísir ein uppgerð, at fleiri kommunur hava valt at spara bókasøvnini burtur við tí úrsliti, at eftir bara fýra árum eru næstan 200 bókasøvn stongd. Tað svarar til ein triðing av øllum bókasøvnunum í landinum, skrivar Berlingske Tidende, sum eisini sigur seg hava fingið varhugan av, at hendan gongdin fer at halda fram aftan á kommunuvalið í næsta mánaði. Í fíggjarætlanunum hjá kommununum fyri 2010 sæst, at fleiri teirra ætla sær at spara á bókasavnsøkinum, skrivar blaðið.



## Norðurlond sum samveldi

Høvdu Norðurlond tikið seg saman í eitt samveldi, hevði tað verið ein eind, sum veruliga kundi gjørt vart við á altjóða pallinum. Tað skrivar svenski søgumaðurin Gunnar Wetterberg í einari grein í blaðnum Dagens Nyheter. Hansara uppskot er, at tey fimm londini taka seg saman í eina eind við Keypmannahavn sum høvuðsstaði og Margrethu sum drotning. Gunnar Wetterberg skrivar, at sum eind høvdu Norðurlond verið ein tann sterkasta búskapareindin í heiminum. Tað er neyvan av tilvild, at grein kemur, nú Norðurlandaráðið heldur fund í Stockholm.

# Meðan kongurin

**Eitt talv á Sandi er av. Páll á Reynatúgvu er farin frá sum borgarstjóri, og maðurin, ið skifti part, situr nú við borðendan. Men áðrenn fráfarni borgarstjórin steðgaði hesum talvinum, stjórnaði hann einum leiki, sum neyvan er sæddur á Sandi í nógv ár**

VALDSSTRÍÐ
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Long tíð er gingin síðan eitt avgerandi talv byrjaði á Sandi.

Ilt er at siga, nær fyrstu leikirnir vórðu fluttir, tí fyrstu leikirnir vóru duldir og seinnu leikirnir hava ikki verið mann til mann, men heldur blað til blað.

Men eftir kommunustýrisfundin í gjár er greitt, at seinastu leikirnir í hesum talvinum eru gjørdir.

Páll á Reynatúgvu hevur nevniliga lagt kongin.

– So havi eg gjørt av at leggja frá mær sum borgarstjóri á Sandi. Ikki tí eg meti tað vera rætt ella rímiligt, men tí at politiski veruleikin nú gjørdist sum hann gjørdist.

Páll á Reynatúgvu lesur úr pappíri, hann hevur fyrireikað til endamálið. Hann sýnist vera avkláraður við støðuna í løtuni.

Brandur Sandoy hevur fingið lítla smílið, sum serliga sæst í eygunum, fram.

Nú veit sandsmaðurin við kubbutu røddini, at hann verður borgarstjóri.

Men áðrenn kongurin varð lagdur, og nýggjur maður varð funnin til borðendan í kommunustýrinum á Sandi, skuldi ein veruligur leikur vísast fyri teimum umleið 30 áskoðarunum, sum vóru komnir saman at síggja, hvussu leikur fór.

### Moralurin farin

Longu áðrenn fundurin byrjaði var støðan spent. Tøgnin ræður millum fólkini í túninum hesar fáu minuttirnar í seks hetta mánakvøldið nærum tveir mánaðir eftir, at fyrsta brævið um kommununa á Sandi varð sent.

– Hetta hevur oyðilagt moralin í bygdini.

Ein sandsmaður harmast stórliga, áðrenn fundurin byrjar.

Úti er logn, og kalt er tað eisini. Og ongin í túninum veit akkurát, hvat fer at henda inni á fundinum, men øll vita, at tað fer spegla vakra veðrið á Sandi.

Avgerandi leikir í talvinum – sum tá tað byrjaði, hevði tøgnina og Postverk Føroya sum sterkastu vápnini, men nú er blivið til eitt opið stríð, sum forðar øllum sosialum tiltøkum í bygdini – skulu flytast.

### Jokarar við útbúgving

So byrjaði leikurin. Pálli á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi, stjórnar leikinum.

Hann hevur sjálvur lagt skránna. Úr Streymonni verða tveir ekspertar drignir til talvborðið.

Grannskoðarin, Finnbjørn Zachariasen, skal greiða frá, hvussu fíggjarliga stýringin í Sands kommunu hevur verið seinastu níggju árini, meðan Páll á Reynatúgvu hevur sitið við borðendan, og Bjørn á Heygum, advokatur hjá Sands kommunu, hevur eisini fingið fundarboð. Hann er biðin at fortelja og tulka svar hjá Innlendismálaráðnum um gegni hjá borgarstjóranum, sum borgarstjórin sjálvur hevur spurt um.

Men fundurin byrjar ikki rættstundis. Meirilutin í kommunustýrinum er ónøgdur, og Fríði Nolsøe, kommunustýrislimur, hevur hondina uppi, áðrenn fundurin byrjar.

– Fleiri mál, vit hava biðið um, eru ikki á skrá.

– Men málini komu ikki inn, fyrr enn freistin var farin.

– Men vit vilja hava tey við á skrá.

Ósemjan millum borgarstjóran og Fríða Nolsøe verður standandi. Men borgarstjórin fær rætt, tí hann leggur skránna.

Borgarstjórin hevur staðfest sína støðu við borðendan, og teir umleið 30 áskoðararnir, sum flest allir stuðla Pálli á Reynatúgvu, sita og smílast eitt sindur nervøst.

Fundurin er jú nóg illa byrjaður.

### Skuld

– Skulu vit ikki fáa gongd á fundin?

Maðurin við borðendan tímir ikki at bíða meir, og vil hava grannskoðaran at greiða frá fíggjarligu støðuni hjá Sands kommunu.

Men Poul Klementsen, komunustýrislimur í meiriluta, hevur fingið ov lítið at vita.

– Líka áðrenn vit byrja. Vit hava fingið ov lítið av tilfari, og kunnu tí ómøguligt gera viðmerkingar.

Hann vil ikki finna seg í háttinum, leikurin verður stjórnaður.

Men borgarstjórin ger skránna og hevur tí altíð fyrsta leikin, so grannskoðarin sleppur framat.

Niðurstøðurnar hjá grannskoðaranum eru greiðar. Sands kommuna hevur hildið tær skyldur, hon sjálv hevur lagt á seg, men hevur til dømis ikki goldið sín lutfalsliga part til Sandoyar Meginskúla.

Páll á Reynatúgvu vil reinsast fyri ákærurnar, at borgarstjórin hevur skuldina av, at Sands kommuna ikki hevur rindað sín part, og tulkar orðini hjá ekspertinum við tølunum.

–Bjørn á Heygum, advokatur, er tað rætt, at ein kommuna má halda sína fíggjarætlan?

– Jú.



*Borgarstjórin hevði millum annað kallað advokat inn at greiða frá gegninum hjá sær sjálvum*

*Páll á Reynatúgvu endaði við at loysa seg úr borgarstjórasessinum og skrivaði undir uppsøgnina*

*Nýggjur borgarstjóri skuldi veljast. Fýra fóru upp fyri Brandi Sandoy*

*Brandur Sandoy, borgarstjóri, við borðendan, har hann loysti Páll á Reynatúgvu av*

Men Brandur Sandoy vil ikki, at hetta skulu vera seinastu orðini.

– Men er tað ikki eisini rætt, at kommunustýrið kann gera eina nýggja fíggjarætlan?

– Jú.

Advokaturin hjá Sands kommunu nikkar, meðan tað næstan ber til at síggja stríðið í luftini millum Brand Sandoy – sum síðan hann gavst at stuðla borgarstjóranum, hevur mist stuðulin frá teimum flestu, sum stillaðu hann upp – og Páll á Reynatúgvu, sum hevur mist stuðulin frá meirilutanum í kommunustýrinum.